## NATO sissar baltar

Í Estlandi, Letlandi og Litava eru fólk ikki serliga fegin um, at NATO roynir at tekkjast Russlandi fyri at fáa viðurskiftini aftur í rættlag aftan á kríggið millum Russland og Georgia. Í einari roynd at sissa fólkið í teimum trimum londunum hevur NATO gjørt av at taka lut í einari stórari hernaðarvenjing í Eystrasalti seinni í hesum mánaðinum. NATO-luttøkan skal sannføra baltar um, at samgongan ætlar sær ikki at sleppa teimum upp á fjall, skrivar AP. Tað verða amerikonsk, fronsk og polsk stríðsflogfør, sum skulu taka lut í venjingini.



## Gevast í løgregluni

Næstan 70 prosent av teimum ungu monnunum, sum byrja í læru hjá løgregluni í Afghanistan, gevast, áðrenn útbúgvingin er liðug. Tað sigur amerikanski heryvirmaðurin William Caldwell, sum stendur á odda fyri arbeiðinum hjá NATO at skipa eina nýggja afghanska løgreglu. Í dag hevur Afghanistan millum 200.000 og 300.000 hermenn og løgreglumenn, men tað talið er alt ov lítið, sigur Caldwell. Sambært honum gevast nógvir ungir løgreglumenn, tí teir verða koyrdir til arbeiðis, áðrenn teir eru lidnir við útbúgvingina og hava tí ikki tann neyðuga førleikan.

# MEST úr hondini í munnin

**- Tað hevur eydnast okkum at fáa nøkur fyrifallandi arbeiði, sum halda einum ávísum virksemi uppi, men støðan er vorðin soleiðis, at vit sjáldan vita frammanundan, hvat liggur fyri framman, sigur bedingsmeistarin á skipasmiðjuni MEST í Havn, Kristoffur Lützen**

ÍDNAÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tvey skip standa uppi á bedingini hjá MEST í Havn í løtuni. Tey eru strandfaraskipið Ternan og línuskipið Venus. Línuskipið Hoyvíkingur hevur eisini fingið sínar ábøtur á bedingini og við bryggjuna.

Við vestaru bryggju liggja annarstveirdjúpvatnstrolarar úr Hvalba - Steintór, sum eldur kom í fyri eini tíð síðan og Sjagaklettur.

### Ymiskt fyrifallandi

Kristoffur Lützen, bedingsmeistari hjá MEST í Havn, sigur, at teir hava fingist við aksilin á Venusi, har ein pakkdós er farin. Skipið kom upp á bedingina mánadagin og er nú um at verða liðugt.

- Vit gera Ternuna klára til sigling um Nólsoyarfjørð. Skipið hevur staðið uppi í eina tíð, og her hevur verið nógv ymiskt at gera. Tað gongur framá við at fáa skipið liðugt, men eg haldi ikki, at nøkur ávís tíðarætlan er løgd fyri, nær Ternan skal verða liðug.

Kristoffur sigur, at Ternan hevur verið til vanligt eftirlit har eitt nú tangar og ventilar eru eftirhugdir, eins og skrokkurin hevur verið til eftirlit.

- Skrokkurin skal reinsast inn á reint stál, og síðan skal hann málast av nýggjum, leggur hann aftrat.

Bedingsmeistarin sigur, at umvælingarnar av skaðanum, sum Steintór fekk, eru um at verða lidnar.

- Eldurin var í maskinrúminum, sum tó ikki først nakað serligt, men tað eru serliga kaðlar og el-instalatiónir, sum eru brendar ella hava fingið skaða, sigur hann.

Kristoffur Lützen sigur, at teir serliga fáast við motorin umborð Sjagakletti, sum er til eftirlit og er tikin sundur, men hann væntar, at skipið verður klárt at loysa aftur í hesi vikuni.

### Hondini í munnin

Spurdur, hvussu næstu mánaðirnir síggja út á bedingini í Havn, sigur bedingsmeistarin, at MEST yvir longri tíð ikki hevur havt so nógv ítøkiligt fyri framman.

- Men tað hevur víst seg, at tá nøkur arbeiði eru liðug, er okkurt nýtt á skránni. Vit vóna, at tað eisini verður soleiðis hesaferð, nú nøkur arbeiði verða liðug, sigur hann.

Kristoffur Lützen vísir á, at MEST soleiðis meiri at kalla livir av tí, sum er úr hondini í munnin – um vit so kunnu siga.

- Men hetta hevur so gingið higartil, nú partur av heimaflotanum ikki hevur havt sínar bestu dagar, leggur hann aftrat.

### Tvey á Skála

Bedingsmeistarin í Havn var staddur á MEST Skála, tá vit høvdu orðið á hann í morgun.

- Vit hava brunnbátin Víking uppi á bedingini. Her verða nakrir metrar av stáli skiftir, og síðan hava vit flakatrolaran Enniberg inni í dokkini.

Kristoffur sigur, at MEST hevur eisini eitt ávíst virksemi á bedingini í Vestmanna og í Runavík, har mest verður arbeitt við rustfríum stáli og framleiðslutøkni.

- Vit liggja framvið og kappast við aðrar um at fáa tey arbeiðir, sum koma undan kavi, og síðan vóna vit, at vit eru nóg góðir og kappingarførir um hesi, sigur bedingsmeistarin í Havn, Kristoffur Lützen.





# Hava fingið væl

ÚTRÓÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Útróðrarmenn, sum lúra upp á at fáa nakrar fiskar á Norðhavinum í vár, raktu við uppundir endan av seinastu viku, tá ein bátur, sum avreiddi á Eiði, fekk heili 3.000 pund.

Síðan fríggjadagin hava fleiri bátar, sum avreiða á Eiði og í Sørvági, verið á snelluveiði eftir várfiski.

Á Bátafiski á Eiði siga tey, at einir 10 snellubátar avreiddu fríggjakvøldið, og hesir høvdu eini 13.000 pund tilsamans.

Besti báturin hendan dagin hevði 3.000 pund, sum er ein góður snelludagur.

Fríggjadagin, sum avreiddi á Eiði, úr 500 upp í 3.000 pund.